# FRÆLSI

*Lille Marie lille Marie flyv op*
*Lille Marie lille Marie flyv op*
*Spekulanternes champagne*
*Smager af prop*
*Lille Marie lille Marie*
*Flyv op*

Og í næsta ørindi er myndin víðkað, so hon hevur fingið kosmiskan vong:

*Vi har kun denne klode*
*I galaksen*
*Pas godt på mælkevejen*
*Lille Marie*
*Marolle*
*Walk the line*

Øll verk, sum nakar dugur er í, hava okkurt serligt rúm ella umráði, sum talar til hjartað hjá tí einstaka, og í slíkum førum hevur ivaleyst tann subjektiva tilgongdin týdning, tí so ymisk vit eru, eru eisini okkara hjørtu. Og tað er ikki yvir at dylja, at tann skering á hesi fløgu, sum undirritaði oftast fer at venda aftur til, er "Sorg", ein gomul donsk vísa, frystandi vøkur, sum Arne syngur í lýtaleysum áralag við ta beinraknu aðru røddina hjá Sine Bach Rüttel, meðan mandolinin hjá Nils Tuxen leggur sína virtuost leikandi tolking aftrat. Bæði tekstur, lag, framførsla og sangarans sublimt nøtrandi klanglitur fáa lurtaran at spyrja seg sjálvan, hvussu tað ber til, at tann – sum tað tykist – upphavsleysa, anonýma fólkavísan best av øllum megnar at skapa grípandi, tíðleysa melankoli. Beint nú veit eg bara um ein tekst, sum (um enn hann er daprari) hevur sama tóna sum "Sorg", og tað er yrkingin "Donal Og", eisini hon skapt av ókendum skaldi, sum Lady Augusta Gregory týddi úr írskum:

*You have taken the east from me;*
*you have taken the west from me;*
*you have taken what is before me*
*and what is behind me;*
*you have taken the moon, you*
*have taken the sun from me*
*and my fear is great that you*
*have taken God from me!*

"Sorg" endurgevur, við vísunnar rímborna sniði og myndum, ið næstan sipa til altargang, ein stemning av sama slagi:

*Der skænket blev for mig*
*To underfulde skåle*
*Den ene fyldt med vin*
*Den anden fyldt med tårer*
*Men tåren drak jeg ud*
*Mens vinen den står klar*
*Den er for dig beredt*
*Som mig bedraget har*

Yvir *En Hjertesag* er ferð, dýnamikkur, fjølbroytni og kensluligt avlop. Tann lýriski dámur, sum er yvir mongum av tekstunum, fær eitt hóskandi mótspæl frá tí ofta heldur stramma og neyva sangháttinum. Av persónum, sum hava givið einstøkum sangum íblástur, kann ein nevna tann týska rithøvundin og kabarettyrkjaran Erich Kästner, Johnny Cash og Barack Obama forseta, sum, heldur Arne, ivaleyst – tað slepst ikki undan - fer at skapa vónbrot, men kortini hevur tendrað eina vónarkertu. Sjálvur hevur Arne, umframt sangin, gittarspæl um hendur. Sine Bach Rüttel leggur sína rødd aftrat summum framførslum. Nils Tuxen syngur og leikar gittara, drobro, mandolin, banjo og bass. Fotomyndin á húsanum er eftir Tobias Plass. Teimum báðum klassisku tekstunum "Drøm om et sted" og "Det er nu" ber Jesper Jensen kannuna av.

Og allir hesir streingir - lýriskir, musikalskir, vokalir og fotografiskir – taka hendur saman til at kveikja áræði, seta rættvísi aftur á dagsskránna, geva teimum mótleysu treysti og fagna tí dýrabaru løtuni:

*Avanti popolo*
*Og Bella ciao*
*Slut med junglelovs*
*Tsunamihav*
*The times they are a changing*
*Drømmer vi i dag*
*Vores liv ku´ blive*
*En hjertesag*

Arne Würgler: *En Hjertesag.* Indspillet af Nils Tuxen. Mixet af Nils Tuxen og Arne Würgler. Mastereret af Jan Eliasson. Fotos Tobias Plass. CD Artwork Maiken Ingvordsen. Fløgan fæst í føroyskum musikkhandlum.



*Myndin er frá seinasta túrinum hjá Barsskor á Trøllanes*

# Søgan um Wolles familjuna út í bók

**Wolles familjan í Trøllanesi og hendingar úr bygdasøguni er evnið í nýggjari bók, sum verður løgd fram í komandi viku**

NÝGGJ BÓK
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Tað er Jákup Andreasen, ið hevur skrivað bókina um Wolles fólkini á Trøllanesi. Søgan byrjar í 1828, tá ein ungur havnarmaður flytur norður á Trøllanes at búgva. Hetta er Rosenmeyer hjá Skipar Hansen, sum var føddur í Havn, og sum frammanundan hevði verið húskallur á Viðareiði. Rosenmeyer var triðyngstur av 20 børnum í tveimum giftum og var uppkallaður eftir handilsstjóranum í Rybergs handli í Vágsbotni. Hann giftist í 1833 við Maluni, sum var yngsta bóndadóttirin úr Innistovu á Trøllanesi.

## Ognarleysir uppisitarar

Rosenmeyer og Malan fluttu inn í eina roykstovu, sum nevndist Uppistova, og sum hevði staðið tóm síðan 1815. Tey vóru ognarleys, men gjørdust uppisitarar hjá skyldfólki hjá Maluni í Mikladali, og tí fingu tey loyvi at giftast. Tríggir menn, sum itu Rosenmeyer, hava búð í Uppistovu á Trøllanesi síðan 1833. Tann seinasti doyði í 1996.

Í bókini um Wolles familjuna og Trøllanes verður greitt frá um eftirkomarar hjá hjúnunum í Uppistovu fram til dagin í dag. Nøkur av hesum fólkum hava Wolles sum eftirnavn, sum Skipar Hansen upprunaliga navngav summum av sínum børnum.

Bókin viðger eisini viðurskifti úr bygdarsøguni, t.d. um skúla og lærarar, postflutning, heilsuviðurskifti, trúarlív og óhapp og vanlukkur á sjógvi og landi.

## Nógvir eftirkomarar

Hjúnini í Uppistovu fingu nógvar eftirkomarar, og sum dømi kunnu nevnast: Jákup Frederik og Hans Petur Øregaard, Elspa á Dul og Oluffa Myglegaard, Símun Jóhan og Rosenmeyer Wolles, Jógvan Isaksen og Finnbogi Ísakson, Fía Høj og Ruth Olsen, Ingvard og Martin Fjallstein, Karl Wolles og Agnas Fjallsá, Ragna Jacobsen og Jórunn Dánialsdóttir.

Bókin verður løgd fram alment hóskvøldið 4. juni klokkan 19.30 í Norðoya Sparikassa. Á framløguni fer Jákup Andreasen at greiða um bókina. Eisini fer Ása Justinussen, sum var gift Finnboga Ísakson, at siga nøkur orð.